UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **21. juni 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-7**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-162/2020 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, til Jenis av Rana, landsstýrismann, settur eftir § 52 a í Tingskipanini. Um vaksnamannalæra og trípartasamstarv.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at fremja avtalurnar viðvíkjandi yrkisútbúgvingum, ið vóru gjørdar í trípartasamráðingum í 2019 ?
2. Fer landsstýrismaðurin at taka upp trípartasamráðingar um vaksnamannalæru ?
3. Um ikki, hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin viðvíkjandi vaksnamannalæru ?

Svar

Til 1: Avtalurnar, sum vórðu gjørdar í trípartasamráðingunum í 2019 eru umfatandi og umfata fleiri øki. Síðan eg tók við sum landsstýrismaður havi eg arbeitt støðugt við at menna og tillaga yrkisútbúgvingarnar, eins og ásett er í samgonguskjalinum. Arbeiðið er grundað á tilmæli um tillagingar av yrkisútbúgvingarøkinum, sum Yrkisútbúgvingarráðið gjørdi í 2018, og sum trípartasemjan eisini byggir á. Tað er greitt, at fleiri av málunum krevja at vera lýst nærri, og tað er eitt arbeiði, sum er í gongd á útbúgvingarøkinum.

Til 2: Eg havi ongar ætlanir um at taka upp samráðingar um vaksnamannalæru í løtuni. Arbeitt verður longu við vaksnamannaútbúgving á ymsan hátt, og við støði í lógini um førleikameting frá 2014 og kunngerðini frá 2018 er møguligt hjá vaksnum, sum ynskja sær prógv innan yrkið, tey arbeiða í, at verða førleikamett, og á tann hátt fáa stytt um útbúgvingartíðina. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við útbúgvingarstovnar og arbeiðsmarknaðarpartar.

Til 3: Vaksin og tilkomin hava møguleika at taka útbúgving og at førleikamenna seg á vinnu- og miðnámsskúlunum og á Fróðskaparsetrinum, umframt at fleiri tilboð eru innan frítíðarundirvísing til dømis við atliti at undirvísing í føroyskum fyri tilflytarum, stakgreinalestri á miðnámsstigi, skeiðum innan sigling og landbúnað umframt lærugreinum á 10. floksstigi.

Harumframt eru fleiri møguleikar fyri førleikameting, og hetta er eitt øki, sum eg ætli at raðfesta framyvir í samstarvi við avvarðandi partar.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður